## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Út á seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind ella skrið av norði og regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hann minkar vindin niður í stívt andøvsgul av vestri, um kvøldið niður í eitt lot. Sólglottar, men eisini ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar. Út á seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið av landsynningi og regn. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av suðri og sirm ella mjørki. Sunnudagin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Barbara í París, London og Berlin

**Føroyski sniðgevarin Barbara í Gongini verður í næstum við á trimum stórum mótamessum, í París, London og Berlin. Her er m. a. talan um víðagitnu Pret a porter messuna í París**

SNIÐGEVING
*Niels Uni Dam*

Barbara sigur, at hon seinastu tíðina hevur fingist við sera ókomersiella sniðgeving, men nú fer hon undir at royna seg á kommersiella pallinum, og eingin ivi er um, at hetta eru ikki hissini støð, hon roynir seg. París, London og Berlin eru millum teir mest spennandi býirnar á mótaøkinum, og bæði Pret a Porter og Bread & Butter í Berlin, eru sera týdningarmiklar messur.

Barbara í Gongini hevur í løtuni úr at gera við at sniðgeva sítt vetrarúrvæl. Hon heldur, at hetta er ein sera spennandi tíð, nógv hendir á mótaøkinum, serliga í norðan londum. So tað er fantastiskt at arbeiða í hesum kreativa umhvørvinum millum øll hesi nógvu gávuríku fólkini, sigur Barbara.



*Barbara í Gongini skal í næstum á messir í París, London og Berlin. Á myndini sæðst eitt av hennara sniðum á eini messu í Keypmannahavn í 2003*
*Mynd Scanpix Danmark*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 15 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 22 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 23 |
| Malta | 20 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 21 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 31 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 27 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 995 hPa. vestan fyri Føroyar grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1003 hPa. vestan fyri Biscaya fer í landnyrðing norðan.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Bretsku Oyggjunum fer norðureftir skamt eystan fyri Føroyar og dýpist nakað. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikukvøldið.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 9/10 kl. 06[00]– 10/10. 06[00]. Hitin í gjár: 9,5°
Minsti hiti máldur í okt.: - 4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 17,0 mm – mált frá 9/10 kl. 06[00]– 10/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 77,1 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

10. oktober Fyrra kvarter
14. oktober Mánin næstur jørðini
17. oktober Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. Okt. | 02.54 | 15.20 | 01.54 | 14.20 | 02.09 | 14.35 | 04.54 | 17.20 | 05.54 | 18.20 | 01.09 | 13.35 | 00.09 | 12.35 | 03.09 | 15.35 | 04.09 | 16.35 | 02.39 | 15.05 | 03.54 | 16.20 |
| 13. Okt. | 03.46 | 16.10 | 02.46 | 15.10 | 03.01 | 15.25 | 05.46 | 18.10 | 06.46 | 19.10 | 02.01 | 14.25 | 01.01 | 13.25 | 04.01 | 16.25 | 05.01 | 17.25 | 03.31 | 15.55 | 04.46 | 17.10 |
| 14. Okt. | 04.35 | 16.58 | 03.35 | 15.58 | 03.50 | 16.13 | 06.35 | 18.58 | 07.35 | 19.58 | 02.50 | 15.13 | 01.50 | 14.13 | 04.50 | 17.13 | 05.50 | 18.13 | 04.20 | 16.43 | 05.35 | 17.58 |
| 15. Okt. | 05.21 | 17.44 | 04.21 | 16.44 | 04.36 | 16.59 | 07.21 | 19.44 | 08.21 | 20.44 | 03.36 | 15.59 | 02.36 | 14.59 | 05.36 | 17.59 | 06.36 | 18.59 | 05.06 | 17.29 | 06.21 | 18.44 |
| 16. Okt. | 06.08 | 18.30 | 05.08 | 17.30 | 05.23 | 17.45 | 08.08 | 20.30 | 09.08 | 21.30 | 04.23 | 16.45 | 03.23 | 15.45 | 06.23 | 18.45 | 07.23 | 19.45 | 05.53 | 18.15 | 07.08 | 19.30 |

5 707265 100036 >